Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hans Jacob Thomsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Um mótrokning í fólkapensjón

Spurningar:

1. Hvussu nógv hevði tað kostað landskassanum at strika mótrokningina í arbeiðsinntøku hjá fólkapensjonistum?
2. Við verandi reglum um mótrokning, hvussu nógv meira at liva fyri eftir skatt og gjøld hevur fólkapensjonistur, sum hevur eina arbeiðsinntøku á ávikavist 20.000 kr. um mánaðin, 27.000 kr. um mánaðin og 35.000 kr. um mánaðin, í mun til ein, sum ikki er fólkapensjónistur, við somu inntøkum.
3. Um mótrokningin verður strikað, hvussu nógv meira at liva fyri eftir skatt og gjøld hevur fólkapensjonsistur við somu arbeiðsinntøku, sum í spurningi 2, í mun til ein, sum ikki er fólkapensjonistur.

Viðmerkingar:
Fólkapensjón er sett saman av grundupphædd og viðbót, sum verða ávirkaðar av tí inntøku, sum tú hevur umframt pensjónina. Sitandi samgonga hækkaði markið fyri, hvussu nógv fólkapensjónistar kunnu tjena, uttan at mótroknað verður í pensjónini, úr 45.000 kr. til 61.900 kr. Inntøka omanfyri markið verður mótroknað við 20 prosentum í fyrstu syftu.

Javnan eru ynskir frammi um, at fólkapensjonistar eiga at sleppa at arbeiða meira, uttan at verða mótroknaði. Tí hesin fyrispurningur.

Á Løgtingi, 9. september 2024

Hans Jacob Thomsen